# hjá Atlantsflogi til Edinburg



*Ein partur av føroyska hópinum, sum var við í ferðalagnum leygardagin, savnaður beint frammanfyri Edinburg Castle*
Mynd: Vilmund Jacobsen

in flytir teg út aftur á flogvøllin til heimferðina.

Fyrrapartin leygardagin og til klokkan 14 seinnapartin koyrdu vit gjøgnum ein part av býnum saman við fryntligum ferðaleiðara – eini tilkomnari skotskari kvinnu. Síðan vórðu vit boðin til døgurða, og tá ið hann var fingin niður um, var restin av degnum upp til okkum sjálvi, til bussurin aftur koyrdi av økinum við Edinburg Castle

Ein slíkur dagtúrur er hugnaligur og áhugaverdur, og hevur tú fyrst gingið tann eina dagin í Royal Mile, sum er gøtan við teimum smáu handlunum, matstovunum og vertshúsunum, hevur tú avgjørt hug til at gera ein túr aftrat, áðrenn summarið er umliðið.

Uppi í endanum á Royal Mile kemur tú niðan á Castle Hill, har Edinburg Castle stendur ovast uppi. Hetta er ein áhugaverdur og stórur skansi frá farnari tíð – tíðini, tá ið skotar bardust ímóti grannunum fyri sunnan, onglendingum.

Byrjar leygarmorgunin við innkeypi í Royal Mile, er einki til hindurs fyri at ganga niðan á Edinburg Castle og harvið fáa eina hóming av teirri ríku søgu, sum skotski høvuðsstaðurin eigur.

## Skotsk summarfrí

Ein dag í Edinburg kemur tú ikki so langt, sum tú kundi hugsað tær, tá ið tú fyrst ert komin hagar, men hetta er ein dagur, sum saktans kann geva tær íblástur til eina summarfrí í hesum áhugaverda og vakra umhvørvi – saman við teimum fryntligu og gestablíðu skotunum.

Leygardagin var veðrið skiftandi; viðhvørt skein sólin, og viðhvørt var heglingsælingur, men tað var lýggjari enn í Føroyum, eini 10-12 stig.

Annika Petersen, sum starvast hjá Atlantsflogi og hevur ferðast nógv í Edinburg-økinum, sigur, at ferðamøguleikarnir í Skotlandi eru nógvir, og hon kann í allar mátar mæla føroyingum til at royna nýggju farleiðina hjá Atlantsflogi, nú møguleikin er til tess.



*Ymiskt forvitnisligt var at síggja, meðan vit steðgaðu við Edinburg Castle – og her er tað eitt brúðarpar sum vitjar*
Mynd: Vilmund Jacobsen

---

# Á føroyskum "veingjum" í seytjan ár

**Atlantic Airways hevur rættiliga sett Føroyar á heimskortið, síðan felagið varð stovnað**

FLÚGVING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Atlantic Airways varð stovnað í november 1987, og 28. mars árið eftir kundu føroyingar flúgva á føroyskum veingjum, tá ið felagið keypti sítt fyrsta flogfar av slagnum, British Aerospace.

Í 1983 keypti felagið sína fyrstu tyrlu, eina Bell 212, til innanoyggjaflúgving, og í 2001 keypti felagið eina Bell 412 til leiting og bjarging.

"Flotin" hjá Atlantic Airways er øktur, sum árini eru liðin, og í 2004 keypti felagið sítt triðja flogfar.

Í dag eigur felagið soleiðis trý flogfør og tvær tyrlur. Haraftrat leigar felagið eitt fjórða flogfar, sum eisini er partur av dagliga "flotanum" hjá AA.

Í sínari tíð vóru tað nógv, sum ivaðust í, um føroyska flogfelagnum fór at vera lív lagað, men tíðin síðan stovnanina hevur prógvað, at tað bar til.

Atlantic Airways hevur rættiliga sett Føroyar á heimskortið, og sigast má, at føroyska flogfelagið hevur tænt føroyingum og Føroyum bæði væl og virðiliga.




*Eitt av flogførunum hjá Atlantic Airways flýgur yvir Edinburg. Myndin er tikin leygardagin – á fyrstu regluligu ferðini til skotska høvuðsstaðin*
Mynd: Vilmund Jacobsen